# Dagbókin - 9.a. í skúlanum við Ósánna

**Góða dagbók J**

Nú sita vit 9.a umborð á Nørruni á veg til Havnar. Vit hava verið í Hetlandi í eitt vikuskifti.

Fyrsta dagin sluppu vit at síggja hotellið, og tað var super lekkurt, síðani fóru vit ein gongu túr ígjøgnum býin.Næstan øll húsini vóru grá og laðað av gróti.

Vit sluppu at royna okkum á okkara "enska" máli, tað var mangan flent eftir okkum innanfyri diskin.

Annan dagin fóru vit at svimja í svimjihøllini, tað var orduliga well. Í svimjihøllini var eitt boblubað, tveir stórir skreiðibanar (rutschebanar), útisvimjihylur, streymhylur og ein café.

Aftan á svimjitúrin fóru vit ein busstúr, vit sóu nógvar golfbanar, nakrar ponyhestar, modernaða skúlan í Scalloway, eitt hús prýtt við skeljum (virkuliga flott). Fleiri oyggjar og býir høvdu líknandi nøvn sum í Føroyum.

Seinni um kvøldið fóru vit út at eta indiskt, tað smakkaði væl.

Nú fara vit í land í Havn. Hetta Hevur verið ein læruríkur túrur, samanhaldið í flokkinum hevur verið gott. Hetta var ein stuttligur og ein ógloymandi túrur.
Bye-bye J

**Góða dagbók.**

Dagurin í gjár byrjaði uml. kl.08.00....

Lagið á mær var gott , tí hetta var síðsti vikudagur , og eg ætlaði mær út seinni um kvøldið at hugna mær saman við góðum vinum.

Men sum dagurin gekk , bleiv eg meira og meira útlúgvað , av tí at eg svav so lítið náttina fyri.

Eftir skúlatíð fór eg heim til døgurða , tað var ógvuliga deiligt at fáa frí.

Tá ið eg so hevði etið , fór eg inn í kamarið at spæla teldu.

Uml. kl.19.00 fór eg til arbeiðis , har skuldi eg arbeiða til kl.21.00.

Tá eg var liðug at arbeiða fór eg út ein túr at ganga saman við mínari bestu vinkonu. Vit gingu runt í býnum og fjasaðu alla somlu tíðina. Vit møttu síðani tveimum vinmonnum hjá okkum, sum bjóðaðu okkum biltúr.

Eisini í bilinum fjasaðu vit , líka til vit mundu sovna.

Tá ið klokkan var uml.04.00 fóru øll hvør til sítt , heim í song...

**Góða dagbók**

Í gjár byrjaði skúladagurin klokkan 8:00. Vit orkaðu illa upp, men kortini vóru vit í skúlanum til tíðina.

Skúlatímarnir gingu ógvuliga seint, men ENDULIGA aftaná 7 langar tímar vóru vit liðug.

Vit fóru heim og sótu og snakkaðu og fjasaðu við kaninirnar. Klokkan 15:50 máttu vit skunda okkum aftur í skúlan, tí hósdagar klokkan 16:00 eru vit lærarar hjá nøkrum børnum í 5 flokki, sum spæla horn. Nú eru 14 dagar síðani tey byrjaðu og tey hava klárað seg stak væl. Tað skula tey eiga nógv rós fyri. Tey duga m. a. at spæla dovni Jákup uttanat.

Klokkan 17:00 vóru vit li?ug og vit fóru heim, og so í býin, og hugnaðu okkum og klokkan 23:00 fóru vit heim at sova zZzZz...

**Góða Dagbók.**

Eg kom upp í morgun klokkan 9:00, tí klokkan 11:45 skuldi eg møta í skúlanum til aðalroynd við hornorkestrinum, tí vit skuldu hava konsert seinni um dagin. Fyrst fór eg undir brúsuna, so fekk eg mær morgunmat, og so fekk eg ikki tíð til meir, tí tá var klokkan 11:30.

Royndin gekk bara væl, og vit høvdu tað ógvuliga stuttligt.

Klokkan 13:30 vóru vit liðug og gjørdu klárt til konsertina, sum var klokkan 15:00, og so skundaði eg mær heim at gera meg klára.

Konsertin gekk bara heilt væl, og til tann eina sangin spældi eg solo, og tað var satt at siga fyrstu ferð eg kláraði at spæla allan sangin uttan ein einasta feil, so tað má sigast, at eg var heppin.

Klokkan 19:30 høvdu vit ball saman við orkestrinum. Vit fingu nógvan góðan mat og spældu „hit med sangen" og sungu og høvdu tað stuttligt.

Nú er klokkan 3:30, og nu orki eg ikki meir, so eg fari at sova.

**Góða nátt.**

<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.

Heinta tíni egnu brúkarabúmerki ...

... tey kunnu fáast við at senda fyrispurning beinleiðis gjøgnum fartelefonina á tel 1441 og viðmerkja TT logo [stuttboð] fyri Brúkarabúmerki, TT kort [stuttboð] fyri Myndaboð og TT ton [stuttboð] fyri Ringitónar.

Brúkarabúmerki
18FOR, 16FOR, 15FOR, 14FOR, 1FOR, 10TEK, 13BIL, 12BIL, 11BIL, 10BIL
1BIL, 8BIL, 1FIL, 7VOR, 1ITR, 1JOL, 16ITR, 6VOR, 1ANN, 26ITR

Myndaboð
1TEK, 3ANN, 1VOR, 2ANN, 13KAR, 5SKE, 2FIT, 2ITR, 2KAR, 6DYR
1BIL, 2TEK, 2TON, 2VOR, 3DYR, 3HEI, 3ITR, 3KAR, 2BIL, 3SKE

Ringitónar
B36 18FAR
Reytt svart 17FAR
Liðið tað eitur KÍ 16FAR
Vit halda øll við NSÍ 15FAR
Her kemur GÍ 14FAR
Tjóðsangurin 3FAR
Ormurin Langi 1FAR
Indiana Jones Theme 15FIL
If I were a rich man 14FIL
American Pie 13FIL
My Heart Goes Boom 9POP
Last Christmas 3JOL
YMCA 8POP
Show me the meaning 7POP
Pedda Post 12FIL
Yesterday 2GAM
Fugladansurin 1GAM
I'm a Survivor 6POP
Uncle Fucker úr SouthPark 11FIL
Lost in Space 10FIL

team85

planet.fo

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum



# Vangamyndin: Heidi Andreasen



## heidi byrjar av nýggjum



**16 ára gamla Heidi Andreasen hevur rættiliga havt luft undir veingjunum, tá tað kemur til svimjingina. EM, HM, OL og so hevur hon eisini verið í uppskoti til at gerast ársins ítróttarfólk. Men skurðviðgerðir og skaðar gjørdu, at alt steðgaði upp hjá henni, men nú er hon spakuliga á veg uppaftur**

Heidi er júst farin til Brasilia, har hon skal verða í eina viku á venjingarlegu saman við danska svimjilandsliðinum, áðrenn leiðin gongur til Argentina til HM.

Til hesa HM kappingina fer Heidi at leggja seg eftir at betra seg sjálva so nógv sum gjørligt. Hon hevur ikki tær heilt stóru vónirnar, tí hon hevur verið plágað av skaða í akslunum, umframt at hon hevur verið til tríggjar skurðviðgerðir í beinunum. Alt hetta hevur havt við sær, at hon noyddist at byrja at venja aftur heilt frá grundini. Tískil væntar hon ikki, at hon fer at gera nakað um seg á hesi kappingini.
- Forvæntningarnir til mín eru stórir, og eg eri sera bangin fyri, at eg ikki fari at kunna liva upp til teir. Men eg má undirstrika, at eg nústani eri við at koma fyri meg aftur og eri farin at venja hundrað prosent, so eg kann ikki annað enn leggja meg eftir at gera mítt besta. Og so er bert at vóna, at eg kann vera nøgd við mítt avrik, tá kappingin er av, sigur Heidi.

Tað var beint eftir EM kappingina í 2001, at Heidi fekk skaða í akslarnar. Skaðin var so mikið umfatandi, at hon mátti steðga við svimjingini eina tíð. Síðani bleiv hon løgd undir skurð vegna brekið í beinunum. Tað blivu so ikki til færri enn tríggjar skurðviðgerðir. Og so mátti hon byrja at venja av nýggjum aftur. Og tað er nakað, sum ikki er serliga hugaligt hjá einum ítróttarfólki, sum hevur verið so langt uppi, sum hon. Tað gekk sera spakuliga fyri seg, og Heidi sigur, at hon var líka við at missa mótið. Men so kom Monaco.

- Monaco gav mær eitt ordiligt spark, sigur hon.

Tá sá hon, at hon veruliga hevði víst nakað í svimjingini, og tað gav henni mót til at halda fram. So tá hon kom aftur úr Monaco í mei, byrjaði hon av álvara aftur at venja. Og nú gongur tað væl hjá henni.

- Eg eri komin fyri meg nú, men tað er sjálvandi langur vegur eftir enn upp til tað, sum eg hevði kunnað verið, um eg hevði kunnað hildið fram, har eg slepti eftir EM í 2001.

## Venur í Havn

Heidi býr á Eiði. Hon venur í Havn saman við Havnar Svimjifelag. Tað hevur við sær, at hon koyrir í millum fimm dagar um vikuna at venja.

- Tað er strævið, men tá tú tímir, tað tú fæst við, so ber alt til. Men mítt lív snýr seg so at siga ikki um annað enn svimjing og skúla beint nú, greiðir hon frá.

Hon gleðir seg til komandi skúlaár, tí tá fer hon at ganga í skúla í Havn. Tá fer hon so at kunna verða við til fleiri venjingar – eitt nú morgunvenjingarnar áðrenn skúlatíð.

Heidi er, sum sagt, nú á veg til HM í Argentina, men fyri framman liggja eisini aðrar kappingar, sum hon hevur sett sær høg mál til.

Í 2003 verður EM aftur og í 2004 Paralympic.

- Paralympic 2004 satsi eg uppá, sigur hon og leggur afturat, at hon fer ikki at hugsa so nógv um, hvat nummar hon blívir til hesa HM kappingina.
- Nú ræður tað meira um at betra mínar egnu tíðir, og at eg sjálv verði nøgd, men tá eg komi aftur, tá fari eg at venja til tær báðar næstu kappingarnar, sum verða í 2003 og 2004, sigur Heidi at enda.






| | |
|---|---|
| **Navn:** | Heidi Andreasen |
| **Aldur:** | 16 ár |
| **Starv:** | Lesandi |
| **Føðingardagur:** | 18.12.1985 |
| **Yndisorð:** | Eg veit ikki |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stór, tá tú vart lítil?** | Kend |